# Samandráttur til heimasíðuna

**Heiti**: marknaðarkanning fyri silda- og makrelúrdráttir í Týsklandi og Hollandi

**Tíðarskeið**: 1. januar 2020 – 31. desembur 2020 (útsett til 31. desembur 2022).

**Samandráttur**:

*Sp/F Tavan í Leirvík hevur síðani 2017 arbeitt við at menna framleiðslur í Føroyum, har pelagiska tilfeingið verður meirvirkað. Í 2018 – 2019 bleiv kannað, um grundarlag var fyri hesum framleiðslum og niðurstøðan av tí kanningini var, at grundarlag var fyri at framleiða kryddaðar og marineraðar sildabitar í tunnur. Síðani varð farið undir marknaðarkanningar í Týsklandi og Hollandi. Til hesa marknaðarkanning fekk Tavan stuðul frá Fiskivinnugransking.*

Framleiðslan av sildabitum er ein gomul svensk siðvenja, og tí eru relatiónirnar hjá verandi aktørum rótfestar. Stórstu kappingarneytarnir eru staðsettir í Norra, og av tí at bæði svenska og norska krónan hava verið veikar í longri tíð, hevur hetta gjørt, at kappingarføri hjá føroyskum fyritøkum er vánaligt. Tað hevur ikki eydnast okkum at funnið kappingarførar marknaðir í Týsklandi og Hollandi, og tí kann í stuttum sigast, at úrslitið við kanningini er, at tað ikki er grundarlag hjá okkum fyri sølu av sildabitum til Týska og Hollendska marknaðin. Stóri marknaðurin er Svøríki, og orsaka av vánaliga kappingarførinum, føroyskar fyritøkur eru í, er grundarlagið fyri hesi framleiðsluni í løtuni burtur.

Samstundis hava vit kannað, um grundarlag er fyri meirvirkan av makreli. Tann stóri makrelmarknaðurin í Týsklandi og Hollandi eru framleiðarar av makreldósum. Hesin marknaðurin verður mettaður av stóru aktørunum á marknaðinum, og tískil hevur okkara fokus verið at funnið niche-marknaðirnar, ið nýta lítlar nøgdir til sermerktar framleiðslur. Tað hevur eydnast okkum at fingið samband við sølufyritøku, ið selur makrelfløk til roykjaríir. Afturmeldingarnar eru góðar, men sølan gongur seinni enn roknað varð vð. Vit hava sent royndir til kundar í Týsklandi og afturmeldingarnar hava verið góðar, so útlit eru fyri, at vøran møguliga kann seljast á Týska marknaðinum eisini.

*Niðurstøðan av marknaðarkanningini er, at tað hevur ikki eydnast okkum at finna ein marknað fyri sild í Týsklandi ella Hollandi, men ístaðin hava vit funnið ein niche-marknað fyri makrelfløk. Vit vita ikki hvussu stórur hesin marknaðurin er, men ábendingar eru um, at marknaðurin er avmarkaður.*